Dagf. 16. juni 2020
HMR J. nr. 20/00536-6

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 96/2019 eftir § 52a í tingskipanini um støðuna á teimum trimum sjúkrahúsunum frá Jákupi Mikkelsen, Frimodt Rasmussen, Beinir Johannesen og Steffan Klein Poulsen

Spurningurin var soljóðandi:

1. Hvat er samlaði kostnaðurin av at broyta nøvnini á teimum trimum sjúkrahúsunum?
2. Eru starvsfólk innan Sjúkrahúsverk Føroya í starvi hjá Sjúkrahúsverki Føroya, ella á tí sjúkrahúsi, tey hava sín gerandisdag?
3. Hava allir tríggir stjórarnir beinleiðis tilvísing til landsstýrismannin?
4. Hví sendi umsitingin hjá landsstýrismanninum í februar mánaða í ár stjórunum fyri Klaksvíkar Sjúkrahús og Suðuroyar Sjúkrahús bræv við boðum um, at hesir báðir stjórar ikki longur skuldu vera stovnsleiðarar í búskaparskipanini fyri ávikavist konturnar hjá Suðuroyar og Klaksvíkar sjúkrahúsi?
5. Fer landsstýrismaðurin at endurskoða menningarætlanina fyri Sjúkrahúsverk Føroya, og taka hana upp til nýggja politiska viðgerð?

Svar:

Til spurning 1
Beinleiðis kostnaðurin av navnakappingini er 81.600 krónur. Kostnaðurin er býttur sundur í virðisløn á 10.000 krónur, framleiðslu av lýsingarátaki, tekstarbeiði, grafikk og lýsing (26.600 kr.) og lýsingaherferð á øllum teimum stóru tíðindaportalunum yvir tríggjar vikur (45.000 kr.). Kostnaðurin er uttan meirvirðisgjald.

Ætlanin er at fáa gjørt nýtt felags búmerki, sum verður felags fyri tey trý sjúkrahúsini og knýtir sjúkrahúsverkið saman. Saman við búmerkinum verður gjørd nýggj sniðhandbók. Tað eru eisini aðrir óbeinleiðis kostnaðir – eitt nú skal stóra skeltið uttanfyri Landssjúkrahúsið skiftast. Vit kenna ikki neyva kostnaðin fyri hetta, men upplýsast kann, at kostnaðurin fyri verandi skelti var 100.000 krónur við uppsetan.

Evni	Upphædd	Viðmerking
Búmerki	42.000,00 kr.	Serstøk játtan
Mini sniðhandbók	48.000,00 kr.	Serstøk játtan
Lýsingaherferð	45.000,00 kr.	Útreiðsla býtast
Lýsing og snið til navnakappingina	26.600,00 kr.	Serstøk játtan
Virðisløn	10.000,00 kr.	HMR
Samlað	**171.600,00 kr.**	

Í broytingaruppskoti landsstýrisins til uppskot til løgtingsfíggjarlóg fyri fíggjarárið 2020 í løgtingsmáli 6/2019 stendur í mun til samantvinning av teimum trimum sjúkrahúsunum, at *"Arbeiðið við at sameina sjúkrahúsini hevur nakrar øktar útreiðslur við sær viðvíkjandi ferðaútreiðslum, leiðslukunning og KT. Ætlanin er at framleiða eina felags heimasíðu, eitt felags búmerki og eina felags visjón fyri sjúkrahúsverkið. Biðið verður um 500 tkr. til endamálið í 2020."*

Navnakappingin er sostatt ein liður í hesi ætlan at sameina tey trý sjúkrahúsini.

Sambært sjúkrahúsverkinum er og hevur tað ongantíð verið ætlanin at beina burtur brævbjálvar og annað prent, seingjarklæðir og búnar orsakað av navnabroytingini. Tá tíðin er komin at bíleggja nýggj prent ella pløgg, verða hesi við nýggja samleikanum.

Til spurning 2
Tað er landsstýrismaðurin, sum setur leiðsluna fyri sjúkrahúsverkið. Tað er sostatt landsstýrismaðurin, ið setur forstjóra, stjórar og varastjórar. Setanarøkið hjá leiðsluni er Heilsumálaráðið og stovnar undir tí við tænastu á einstaka sjúkrahúsinum og í Sjúkrahúsverkinum.

Flest øll starvsfólkini eru í starvi á Landssjúkrahúsinum, Klaksvíkar sjúkrahúsi ella Suðuroyar sjúkrahúsi. Síðani tey trý sjúkrahúsini í 2018 formliga vórðu skipað undir eina felags leiðslu, eru fleiri serlæknar settir í Sjúkrahúsverki Føroya, men við staðseting á ávísum depli á Landssjúkrahúsinum. Áðrenn setanarmyndugleikin fyri tænastumenn í Sjúkrahúsverki Føroya í 2001 varð fluttur til sjúkrahúsini, vórðu yvirlæknar á ávísum serøkjum eisini settir í Sjúkrahúsverki Føroya við tænastu á Landssjúkrahúsinum.

Til spurning 3
Tá lýst varð eftir forstjóra fyri sjúkrahúsverkið í 2017, varð tað ásett, at forstjórin hevur endaligu ábyrgdina av rakstrinum av sjúkrahúsverkinum mótvegis Heilsumálaráðnum. Henda skipan varð formliga sett í verk 1. januar 2018.

Ovasta leiðsla er sostatt skipað við einum forstjóra og tveimum stjórum, og er tað forstjórin, sum hevur seinasta orðið, tá talan er um tvístøður. Út yvir at vera stjórar í sjúkrahúsverkinum, eru stjórarnir eisini dagligir stjórar á einstøku sjúkrahúsunum. Stjórarnir á Klaksvíkar sjúkrahúsi og Suðuroyar sjúkrahúsi vísa til forstjóran.

Til spurning 4
Orsakað av skiftandi leiðslum í sjúkrahúsverkinum og tekniskum avbjóðingum, dró tað út at seta í verk henda partin av bygnaðarbroytingini.

Eftir at ovasta leiðsla í sjúkrahúsverkinum aftur var fullmannað á heysti 2019, varð farið undir aftur at broyta leiðslukunningarskipanina fyri at skipa stigveldisskipanina tekniskt, soleiðis at hon var í samsvari við bygnaðin í sjúkrahúsverkinum. Sum ein liður í hesi ætlan sendi Heilsumálaráðið í februar mánað boð um hesa broyting.

Til spurning 5
Arbeitt verður støðugt við at menna sjúkrahúsverkið við grundarlagi í menningarætlanini fyri Sjúkrahúsverkið frá 2016.

Sjúkrahúsleiðslan hevur regluligar fastar fundir, har felags mál verða umrødd og viðgjørd. Sjúkrahúsleiðslan hevur sett eina høvuðssamstarvsnevnd við umboðum fyri øll trý sjúkrahúsini, sum hevur regluligar fundir um felags mál.

Harumframt verður skipað fyri umleið trimum menningarfundum um árið millum landsstýrismannin, leiðsluna í Heilsumálaráðnum og yvirskipaðu leiðsluna fyri Sjúkrahúsverk Føroya. Endamálið við hesum fundum er at fylgja við og tryggja, at tilmælini í menningarætlanini verða sett í verk, umframt at onnur mál og avrik kunnu verða umrødd á hesum fundum.

Sum landsstýrismaður taki eg undir við tilmælunum í ætlanini, og er ætlanin framhaldandi at arbeiða við tí, sum menningarætlanin leggur upp til.

Sjúkrahúsverkið er nú fullmannað við trimum stjórum og fýra fakligum varastjórum, sum í felag hava ábyrgdina av at leggja til rættis viðgerðir og tænastur tvørtur um sjúkrahúsini, soleiðis at samlaða tilfeingið í sjúkrahúsverkinum verður nýtt so skilagott sum gjørligt. Hetta vil við øðrum orðum siga, at leiðslan hevur myndugleika til – innan fyri karmarnar í sjúkrahúslógini og teimum kørmum, sum politiska skipanin setir – at skipa funktiónirnar upp á tvørs av sjúkrahúsunum.

Sum landsstýrismaður leggi eg stóran dent á og havi fult álit á, at leiðslan fer at megna at skipa og samskipa arbeiðið, soleiðis at sjúkrahúsini í nógv størri mun fara at virka sum ein samanhangandi virkislig eind, sum samstarvar í øllum lutum fyri at veita sjúklinginum bestu tænastu, og vit harvið fáa tað mest optimala burturúr sjúkrahúsverkinum í okkara lítla landi.

Heilsumálaráðið, 16. juni 2020

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður